

# Elin Heðinsdóttir Joensen

*Hvussu fert tú at halda jól í ár?*
Vit halda annað hvørt ár jólaaftan saman við mínari familju og annaðhvørt ár saman við Regin'sa familju. Í ár verða vit saman við Regin'sa familju jólaftan. Øll míni systkin við familju verða heima til jólar í ár, so jóladagarnir verða eisini saman við teimum. Børnini gleða seg at verða saman.

*Hvat etir tú til døgurða á jólum?*
Gás av trøðni í Havnardali og dunnu eta vit jólaaftan. Hinar dagarnar verður ofta etið fleskasteik og ræst kjøt.

*Hvat er tað besta við jolum?*
Jólini og desember mánaði eru ein hugnalig tíð, og mær dámar alt við jólunum, og tí sum har til hoyrir

*Hvat er minni gott við jólum?*
Man etur ov nógv og rørir seg for lítið

*Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?*
Nei.

*Hvønn jólatónleik dámar tær best?*
Allan, bæði føroyskan og útlendskan.

*Hvat ynskir tú tær í jólagávu?*
Eg havi einki serligt ynski, men mær dámar væl at fáa onkra bók.



















